# Nyrup var meira opin



John Johannessen

Eftir fyrstu hálvu av aðalorðaskiftinum á fólkatingi í gjár um rískisrættarligu støðu Føroya fyrrapartin í gjár, helt føroyski fólkatingslimurin, Óli Breckmann, greiðar ábendingar vera um, at danski forsætisráðharrin fór at verða at tosa við tá samráðingarnar halda fram.

Óli Breckmann sigur, at Poul Nyrup Rasmussen sýntist at vera meira opin fyri at viðgera málið seriøst, enn hann var undir fyrsta samráðingarumfarinum fríggjadagin 17. mars.

Serliga áhugaverda heldur Óli Breckmann framsøgurøðuna hjá Jan Petersen úr Sosialdemokratiet vera. Hann heldur tað vera sera áhugavert, at Jan Petersen í røðu sínar leygi upp til, at blokkstuðulin skal burtur, líkamikið um Føroyar fáa fullveldi ella ei.

Hetta, heldur Óli Brekkmann, eigur at minka um áhugan millum føroyingar fyri einari loysn innan fyri ríkisfelagsskapin.

Óli Beckmann gjørdi tó greitt í stuttu samrøðu síni við Sosialin á middegi í gjár, at orðaskifið enn var komið so mikið stutt, at hann ikki kundi gera nakra serliga ítøkiligar viðmerkingar til orðaskiftið.

# Víðgongdir møguleikar fyri sjálvstýri

John Johannessen

Jóannes Eidesgaard heldur, at røðan hjá danska forsætisráðharranum undir aðalorðaskiftinum á fólkatingi um ríkisrættarligu støðu Føroya var bæði góð og áhugaverd.

Hetta segði hann við Útvarp Føroya í steðginum av orðaskiftinum á døgurða í gjár.

Jóannes Eidesgaard er samdur við danska forsætismálaráðharranum um, at tað eru víðgongdir møguleikar fyri at koma víðari á sjálvstýrisleið, sjálvt um Føroyar verða verðandi í ríkisfelagsskapinum. Í hesum sambandi vísti hann fyri útvarpinum á, at hann metir ætlan landsstýrissins, sum at fara yvir um ánna eftir vatni.

Poul Nyrup Rasmussen vísti í røðu síni á, at tað ber til at fáa staðfest ein sáttmála hjá ST um, at Føroya løgmaður fær víðgongdar heimildir á uttanríkispolitiska økinum, sjálvt um Føroyar verða verðandi innan fyri ríkisfelagsskapin.

Eisini vísti Poul Nyrup Rasmussen á, at til ber at gera eina avtalu um, at Føroyar so við og við taka yvir og fáa fult ræði á nøkrum ávísum málsøkjum. Tað, sum lá í orðunum hjá forsætisráðharranum var, at føroyingar kunnu fáa víðtøkt sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

Hesum sjónarmiðum var Jóannes Eidesgaard sambært útvarpinum samdur í.

Jóannes Eidesgaard vildi ikki gera nakrar siga nakað um, hvat hansara støða er til, at Nyrup fer at halda fram at føra harðar samráðingar. Hann vísti útvarpinum á, at hann ikki er partur av samráðingarnevndini, og tískil hevur hann einki við samráðingarnar at gera.



Jóannes Eidesgaard á røðarapallinum í Fólkatinginum seinnapartin í gjár. Mynd: Føroyska Tíðindastovan

# Føroyar skulu hava veruligt sjálvræði

*Jóannes Eidesgaard heldur fullveldisætlan landsstýrisins bert geva formelt sjálvstýri, meðan sjálvstýrisuppskot Javnaðarfloksins leggur upp til veruligt sjálvstýri*

John Johannessen

Javnaðarflokkurin hevur sum mál at at fáa ein sjálvstøðugan búskap, so tað einaferð fer at bera til at taka støðu til ríkisfelagsskapin uttan at hugsa um fíggjarligar bindingar millum Danmark og Føroyar.

Hetta gjørdi Jóannes Eidesgaard, fólkatingslimur og formaður í Javnaðarflokkinum, greitt í framsøgurøðu síni undir aðalorðaskiftinum á um ríkisrættarligu støðu Føroya á fólkatingi í gjár.

Jóannes Eidesgaard vísti á, at sjálvtýri ikki er eitt úrslit av einari politiskari samtykt, men úrslitið av einari miðvísari tilpassan av samfelagnum. Men sambært Jóannesi Eidesgaard, leggur ætlan landsstýrisins upp til beint tað øvugta.

– Eftir ætlan landsstýrisins fáa vit tað sminkaða, formella sjálvstýrið, meðan vit eftir okkara ætlan fáa veruligt sjálvstýri, ið verður bygt út í takt við fíggjarligu og umsitingarligu orkuna í Føroyska samfelagnum, segði Jóannes Eidesgaard í røðu síni.

**Samanhald avgerandi**

Jóannes Eidesgaard gjørdi nógv burturúr sosialdemokratisku hugsjónini í røðu síni. Hann vísti á, at sosialdemokratiski grundarsteinurin í flokki hansara ger, at flokkurin sær ríkisfelagsskapin á annan hátt enn tey fullveldissinnaðu gera.

– Vit raðfesta fyrst og fremst fría møguleikan at taka egnar avgerðir. Vit leggja dent á menniskjaliga møguleikan til sjávi at ráða yvir einum lívi við møguleikum hjá øllum at hava eitt virkið og innhaldsríkt lív.

Formaður Javnaðarfloksins vísti á, at flokkur hansara vil, at øll samfelagslig menning í Føroyum hevur eitt til endamáls at skapa eitt solidariskt samfelag fyri fræls fólk, har umsorganin fyri felags áhugamálum og vælferðini hjá fólki er í hásæti. Hann vísti á, at allur politikkur floksins er bygdur á hetta grundarlag og eisini stremban ímóti at fáa fíggjarligt sjálvbjargni.

Júst hetta, vísti Jóannes Eidesgaard á, er grundarlagi fyri at fáa sjálvræði. Í sama sambandi vísti Jóannes Eidesgaard á sjálvstýrisuppskot Javnaðarfloksins.

**Skulu hava sjálvræði**

Jóannes Eidesgaard vísti í røðu síni á, at veruligt sjálvstýri ikki er ein romantisk rørðsla, men úrslit av miðvísum arbeiði. Tí helt hann, at javnaðarflólk júst á hesum økinum áttu at verið ringa samvitskan hjá romantikarunum.

– Sjálvsagt skulu vit hava víðkað sjálvstýrfult fíggarligt og umsitingarligt sjálvræði, segði Jóannes Eidesgaard og vísti á, at hann ikki vil verða verðandi í ríkisfelagsskapinum bert fyri at fáa pening, men fyri samanhaldið.

## Skal ikki líkjast ‘46

John Johannessen

Danska stjórnin fer ikki at leggja fram nakað alternativt uppskot til fullveldisætlanina.

Hetta gjørdi danski forsætisráðharrin greitt í røðu síni á fólkatingi í gjár undir aðalorðaskiftinum um ríkisrættarligu støðu Føroya. Poul Nyrup Rasmussen vísti á, at tað er landsstýrið, ið hevur tikið stig til ríkisrættarligu samráðingarnar, og tí skal landsstýrið eisini taka ábyrgd av teimum avleiðingum, fullveldisætlanin kann hava við sær.

Poul Nyrup Rasmussen gjørdi greitt, at útgangsstøðið fyri samráðingunum er samráðingaruppleggið frá landsstýrinum og einki annað. Hann vísti á, at tí hevði tað verið skeivt av stjórnini eisini at lagt eitt uppskot fram.

## Grønland vil hava innlit

John Johannessen

Grønlendska landsstýrið metir fullveldissamráðingarnar millum landsstýrið og donsku stjórnina vera so mikið áhugaverdar og týdningarmiklar, at tað ynskir at fáa eygleiðarastøðu í samráðingunum.

Hetta merkir, at Grønland fær útflýggjað øll skjøl, ið koma á borðið í sambandi við samráðingarnar.

Landstingslimurin, Johan Lund Olsen, ið eisini er limur í grønlendsku sjálvstýrisnevndini, ið varð sett eftir seinasta landstingsval, tað hava týdning, at triðji ríkisluturin - nevniliga Grønland - fær møguleika fyri at fylgja væl við í tí, sum hendir í samráðingunum. Hann heldur, at hetta er ikki annað enn legitimi rættur grønlendinga.



# Kunnu ikki hála fólk til samráðingarborðið

*Hensar Ellingsgaard torir ikki at meta um, hvørt arbeiðssteðgurin dregur so langt út, at hann nervar munnligu próvtøkurnar beinleiðis, men hann ásannar, at trupulleikin er, at næmingarnir fáa ikki undirvísing*

**Læraraverkfallið**

Dagfinn Olsen

Sum so er eingin vandi fyri skrivligu próvtøkunum í fólkaskúlanum, tí uppgávurnar eru klárar.

Hetta sigur Hensar Ellingsgaard frá fólkaskúladeildini í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

- Uppgávurnar eru tøkar og próvtøkurnar eru í seinnu helvt av maj, sigur Hensar Ellingsgaard og váttar, at tær kunnu fara fram, uttan mun til, um lærarar eru til arbeiðis ella ikki.

- Men at næmingarnir ikki fáa neyðugu undirvísingina og at foreldur er ótrygg viðvíkjandi hesum, er ein annar trupulleiki, ásannar Hensar Elingsgaard.

**Verri við tí munnliga**

Hann metir, at beint nú er eingin bráfeingis vandi á ferð, men koma vit longur og arbeiðssteðgurin í fólkaskúlanum heldur fram, so er illa statt.

Tær munnligu próvtøkurnar eru í juni. Tá skulu lærarar helst vera til arbeiðis.

Hensar Ellingsgaard torir ikki at meta um, hvørt arbeiðssteðgurin dregur so langt út, at hann nervar munnligu próvtøkurnar beinleiðis.

Praktiska arbeiðið í samband við munnligu próvtøkurnar verður ikki nervað sum er, tí t.d. taka skúlaleiðslurnar sær av at finna próvdómarar.

**Mugu samráðast**

- Men hin trupulleikin er jú, at næmingarnir fáa ikki lisið. Teir fáa ikki undirvísing. Hinvegin skal skúlin tryggja neyðugu dygdina í undirvísingini, sigur Hensar Ellingsgaard.

- Undirvísingar- og Mentamálastýrið kann ikki hála fólk aftur til samáðingarborðið, ásanar Hensar Ellingsgaard, sum metir, at einasta gongda leið er, at partarnir aftur hittast og sessast við samráðingarborðið.



*Hensar Ellingsgaard metir, at einasta gongda leið er, at partarnir aftur hittast og sessast við samráðingarborðið*

# Aloyggja skúlanevndarfundur

*Í gjár hittust í Havn formenninir í øllum skúlanevndum í landinum.Talan er um nevndir fyri skúlar, ið hava framhaldsdeild og á skránni var støðan í skúlanum, nú arbeiðssteðgur hevur verið í 4 vikur*



*Í gjár hittust skúlanevndir fyri skúlar við framhaldsdeild á fund við skúlaráðið í Havn. Umboð komu úr øllum landinum Mynd: Jens Kristian Vang*

**Læraraverkfallið**

Dagfinn Olsen

Egon Øregaard, skúlaráðsformaður í Havn, tók í gjár ímóti skúlanevndarformonnum úr skúlanevndum fyri skúlar við framheildsdeild. Umboðini komu úr øllum landinum.

Orsøkin til, at skúlanevndarformenn úr øllum landinum stevndu til Havnar var, at teir í felag viðgjørdu støðuna í fólkaskúlanum, nú arbeiðssteðgur hevur verið millum sáttmálasettar lærarar í meira enn 4 vikur. Nevndarumboðini ætlaðu at finna fram til, hvussu tey kundu gagna gongdini í annars fastlæstu støðuni millum Føroya Lærarafelag og myndugleikarnar.

HEIMA BIO



The Blair Witch Project



Star Wars Episode 1

VIDEOTOP 10

VIKA 14

1 She's all that
2 Sex Games
3 Runaway Bride
4 EDtv
5 Eyes Wide Shut
6 Wild Wild West
7 Kærlighed ved første hik
8 Lokkeduen
9 Arlington Road
10 Forces of Nature

petur & petur 320870

| | |
|---|---|
| Í Gundadali | tel. 31 47 70 |
| Í Kollafirði | tel. 42 10 83 |
| Í Saltangará | tel. 44 91 33 |
| Í Klaksvík | tel. 45 73 53 |
| Í Sørvági | tel. 33 20 01 |
| Í Leirvík | tel. 44 33 60 |
| Í Skálafirði | tel. 44 12 00 |

STATOIL

støðirnar kring landið